# Góði brúkari av undirvísingartilfarinum “Norðurlanda-Trillibørutúr”

- Satt at siga, so eru allar søgurnar í ljóðbókini søgur, vit hava møtt á okkara rundferðum í Norðurlondum. Onkrar av teimum hava vit kanska smíðað víðari upp á ....

- Vit halda, at Norðurlond hava stóran týdning. Bergur er úr Føroyum, og eg eri úr Danmark. Hetta er okkara triðja verkætlan í Norðurlondum. Fyri okkum er tað týdningarmikið at fáa børnini at uppliva norðurlendska felagsskapin, sum vit eru ein partur av.

  Hetta er orsøkin til, at vit hava gjørt hetta undirvísingartilfarið. Við tí royna vit at sáa spírar av vitan um Norðurlondini, sum vónandi vil birta hugin hjá børnunum til at vilja læra meira.

- Við okkara leisti ætla vit, at børnini og næmingarnir uppliva okkara framførslu ella lesa og lurta eftir okkara ljóðbók og album við sangunum; hetta er við til at menna børnini motoriskt og málsliga; tey læra um ymisku tíðarskeiðini í søguni og um, hvussu bólkar rigga sosialt. Tær fakligu uppgávurnar í arbeiðsbókini hjálpa børnunum eisini at síggja, hvussu Norðurlondini líkjast, og hvussu tey eru ymisk.

- Hugsjónin við undirvísingartilfarinum er at nýta sera fjølbroyttar tilgongdir til, at børnini og næmingarnir læra. Børnini uppliva framførsluna, tey lurta til ljóðbókina, tey eru við í okkara verkstovu aftan á framførsluna, tey fáast við okkara arbeiðsbók í barnagarðinum ella í skúlanum. Børnini fáa ymiskar uppgávur: tey skulu tekna, sniðgeva, mála, klippa og klistra; tey syngja, dansa, hoppa og grulva.

  Stutt sagt læra børnini gjøgnum sansirnar og eina ørgrynnu av úttrykkum. Á hendan hátt tryggja vit, at vit í størst møguligan mun raka børnini á onkran hátt, og at vit elva til, at børnini læra um estetikk. Okkara roynd er, at vit soleiðis skapa fjølbroytta undirvísing. Børnini verða bergtikin, tí undirvísingin ikki er einstáttað og krevur av børnunum, at tey sita still alla tíðina. Um vit hava sitið still eina góða løtu, syngja vit kanska ein sang við rørslum. Vit syngja, dansa og spæla. Vit varnast, at vit hava ein kropp.

- Hetta er okkara fakliga grundarlag:

    - Lone hevur eina bachelor í myndlist og eina rytmiska útbúgving frá Rytmisk Konservatorium hjá Lotte og Morten Kærså. Hon hevur eisini prógv í pædagogikki, didaktikki og psykologi.
    - Bergur hevur arbeitt sum sjónleikari, tónleikari, sangari og komponistur í fleiri høpum. Nú studerar hann kontrabass á Musikkonservatorium í Prag.
    - Vit hava ferðast runt øll Norðurlond. Soleiðis hava vit so at siga savnað eina stóra “trillibøru”, sum er full av praktiskum royndum. Allar royndirnar hava vit so aftur latið okkara tilgongd komið til góðar.

- Okkara vón er, at tit øll fáa stóra gleði av at vera við á okkara Norðurlanda-Trillebørutúr!

## Undirvísingarætlan til Norðurlanda-Trillubørutúr

- Lurta eftir ljóðbókini – allari í senn ella leikmynd eftir leikmynd.
- Lurta eftir savninum (albumminum). Nýt sangirnar, so teir undirbyggja tað evnið, sum tit arbeiða við. Ella nýt teir, so tit fyrst og fremst røra tykkum til teir.

1. **Uppslag:** arbeið við evninum “Hvar búgva tit? Hvat er eyðkent her? Hvørji Norðurlond eru?” Hygg eftir teimum norðurlendsku fløggunum. Lat børnini lita hvør sín snór við norðurlendskum fløggum.
   Tilfar: *<u>A4-pappír og langur snórur, litblýantar og heftimaskina, seymir ella teknistiftir til at hanga flaggsnórin upp við.</u>* Prenta flaggformin, lat børnini lita fløggini, klipp tey út, líma fløggini á snórin, hang flaggsnórin upp inni í rúminum (stovuni), har Norðurlondini skulu vera í miðdepli.
   Hygg eftir myndum av ymiskum landsløgum í Norður londunum og tosa um tær. *<u>Lat næmingarnar/børnini fáa A3 støðd av brúnum pappíri (kardúspappíri).</u>* Být tey upp , so tey skullu gera landsløg og bara landsløg (ongin hús, menniskju (fólk), bilar v.m.). Deil tey upp í bólkar, soleiðis at hvør bólkur arbeiðir við at mála landslagið í einum landi. Finn myndatilfar á alnótini, sum tey kunnu hella seg afturat, myndir av repjamarkum, fjøllum, klettum, furutræsskógum (tey flestu børnini hava helst ikki ferðast so nógv í teimum norðurlendsku londunum.....).

2. **Uppslag:** Hvat kann hugflogið? Lurta eftir og lær sangin “To bananer” og en kande vand. Og tosa um, hvat meinast við.

3. **Uppslag:** Lurta eftir og lær “Ørnadansin”, søguna og dansin. Hava tit sæð ørnir? Nei? Tað er kanska, tí tit ikki hava lært ørnadansin. Tí tá koma ørnirnar júst til tín.

Sig frá, hvussu ógvuliga stórar ørnir í veruleikanum eru. Dansið ørnadansin. Finn myndir á alnótini av havørnini við veingjavídd á 2,5 metrar. Royn og lýs hennara stødd, so næmingarnir skilja, hvussu øgiliga stór hon er í mun til ein gráspurv. Hvussu nógv børn kunnu standa við síðuna av hvørjum øðrum undir ørnaveingjunum?

4. **Uppslag:** Hvat eta vit, og hvat eta tey í hinum Norðurlondunum? Hvat er eins, hvat er ymiskt? Finn t.d. serligar rættir á alnótini, sum koma úr teimum ymisku Norðurlondum. Tekna tín egna miðmála (frokost). Hvat droymir tú um at eta til miðmála? Evt. Tosa um, hvussu máltíðirnar eita í hinum Norðurlondunum. “Frokost” í Danmark etur man mitt um dagin. “Frukost” í Svøríki og “frokost” í Noregi er morgunmatur, hóast tað er næstan tað sama orðið...

5. **Uppslag:**
Tosið um, hvørji djór og fiskar liva á sjónum. Tekna títt egna hav.

Printa memoryspælið út, lat børnini/næmingarnar lita memorybrikkarnar við litblýantum og lat tey klippa brikkarnar út, so gott tey kunnu. Nú kunnu tey spæla so nógv tey vilja, í skúlanum ella heima.

At arbeiða við bilkortunum: Printa bilkortini frá heimasíðuni út. Nýt tey til at læra meira um tey Norðurlondini. Kortini kunnu leggjast í raðfylgu eftir ymiskum kriterium: t.d. størsta vídd (areal), flest íbúgvar, ella í bunkar við kongadømi ella republikki.

- 6. **Uppslag:** Lurtið eftir 'Hundeslæden’ sanginum og arbeiðið við honum. Byrja við at vera hundasletaførari. Gevið møguliga einum av børnunum/ næmingunum tann leiklutin.

- 7. **Uppslag:** Minnist tú okkara gandaorð?

9. **Uppslag:** Lurtið eftir sanginum og arbeiðið við honum: ’Har du nogensinde’. Lat tað birta dreymar um, hvar børnini kundi hugsað sær at ferðast við trillubøruni. *Tekna tykkara egnu ferð, hvussu høvdu tey viljað ferðast? Hvat slag av akfari, hvønn veg, hvat slag av viðføri osfr.?*

- 10. **Uppslag:** Nú seta vit sjóneykuna á djór í Norðurlondum: Hvørji djór kenna børnini longu, og hvørji skulu tey læra at kenna? Teknið djórini í Norðurlondum. Býtið børnini í bólkar, so tey tosa um og tekna djór úr Norðurlondum.
  *Tilfar:* Brúkið *A3 hvítt pappír í góðari góðsku og litblýantar. Bið tey um at tekna stórt. Tað kann vera eitt gott hugskot, at tey fyrst fáa ein heilt vanligan blýant og síðani verða biðin*

*um at lita tað, tey hava teknað við blýanti. Bið tey at enda um at klippa djórini út sum frægast.*

At enda kunnu tit hanga eina stóra felags mynd av Norðurlondunum upp í flokkshølinum. Her kunnu djór og landsløg savnast.

*Klistrið øll londini upp, eitt fyri og annað eftir, á einari rullu av tunnum pappi , so tað verður til ein lang mynd, sum kann prýða flokshølið.*

Øll fløggini, sum næmingarnir hava gjørt, verða eisini hongt upp í flokkinum. Soleiðis verða Norðurlondini til eina ítøkilig mynd, sum festir seg í hugan hjá børnunum. Kanska kunnu næmingarnir finna nøkur av djórunum í lívfrøðistovuni á skúlanum. Annars er eitt gott hugskot at hyggja í uppslagsbøkur.

- 11. **Uppslag:** Hyggið eftir uppslagnum við árstíðunum: Hvør árstíð manglar? Hvørja árstíð dámar tær best? Øll Norðurlondini hava árstíðir! Tað eru ikki øll lond, har munurin á árstíðunum er so stórur.
- 12. **Uppslag:** Vit seta sjóneykuna á sagnir: Lesið tær upp fyri børnunum og tosið við tey um sagnirnar. Hvat er teirra boðskapur? Kópakonan (Føroyar), Eldrevurin (Finland), Havsins Móðir (Grønland). Her er eitt hugskot, hvussu tit kunnu arbeiða við sagnunum: Gevið børnunum leir. Bið tey skapa tað, sum tey vóru mest bitin av í sagnunum. Um onkur ikki minnist, hvat tey vóru mest hugtikin av, nevn so tíggju ting, sum kundu verið viðkomandi. Lat leirið harðna, og mála á leirið við máling, sum riggar til leir. Finn evt. aðrar sagnir, sum tú heldur eru viðkomandi at arbeiða við.

  *Tilfar: Nýtið leir og/ella ostavoks til at sniðgeva figurar. Um tú hevur valt leir, kanst tú mála á leirið við akrylmáling. Vel hvítt (hetta gevur eitt meira reint útrýkk), nýtið penslar, sum rigga til. Minst til at dekka yvirflaturnar, har tit arbeiða. Tá tit vísa leirfigurarnar fram, stillið teir tá á eitt stórt toystykki ella á eitt stórt pappír.*
- Lurtið eftir sanginum 'Kamchatka Krabben': Tosið um kamchatka krabbarnar: Teir koma m.a. úr Norðurnoregi, lurtið eftir søguni og sangum, og spælið sangin. Latið børnini grulva sum krabbar. Latið ein bólk syngja, meðan hin bólkurin er krabbar.
- Allir tekstir og nótar eru at finna á heimasíðuni, so alt tilfarið kann eisini vera partur av tónleikaundirvísingini.
- Savnið alt saman til eina framsýning, og bjóðið foreldrum ella øðrum flokkum ella stovum at síggja tykkara Norðurlond. Góða ferð!

Kærar heilsanir, Lone & Bergur